

*Tónleikurin hjá Anytime svingaði sera væl*

lagið virkaði heilt skeivt. Nógvur poppur var at finna í bólkinum hetta kvøldið. Tað var eitt sindur keðiligt, tá man forvæntar feitan punk tónleik. Men teir gjørdu nógv burtur úr í seinna lagnum, sum var fangandi og øgiliga stórt í sær. Fólk vóru íhvørtfall við uppá tað, so tað var bara feitt.

### SIC

Tungasti og myrkasti bólkurin í landinum kom á pallin, og fólk vóru púra vill eftir at sleppa heilt fram til scenuna, so at man kundi standa og gløða upp í høvdið á hesum sannførandi heavy rokkarunum. Tað bleiv skrúvað upp fyri anlegginum og fyrsta lagið fór ígongd. Jørðin ristist og eg saman við restini av fjølduni pissaðu í buks og misti ondina. Tað var ein heilt ótrúlig orka og samanspælið var perfekt. Tað rungaði í húsinum, tá ið Mikkjal bara segði so lítið sum eitt orð í mikrofonuna. Tað simpulten kom eldur í. Men alt ov nógvur roykur bleiv sendur út á pallin av "roykmaskinunum". Tað vóru tíðir har man ikki sá ein meter. Keðiligt nokk hugnaði eg mær so ótrúliga nógv, tá SIC framførdu, at eingin vánaligur kritikkur var at finna. Sorry.

### Týr

Sum seinasti bólkur á pallinum byrjaðu og endaðu teir við einum lagi har eg ikki fekk sett tónleikin á tað støði, at man kundi nikka við høvdinum. Tað var ikki tað rætta lagið at taka við til GBOB. Eg eri ikki heilt sikkur í, hví hetta lagið bleiv spælt. Men so leingi onkur var glaður, so var eg glaður. Nakað av fjøldini dámdi tað sera væl, og tað var bara feitast. Eg meini, at Týr burdi komu við nýggjum tilfari og kanska uppdaterað ljóðið eitt sindur.

### Vinarin var Marius

Ìmeðan man bíðaði eftir at fáa kungjørt vinnaran gekk man eitt sindur runt umkring og tosaði við fólk um, hvat var in og hvat var ýt. Favorittarnir vóru heilt uttan iva teir tríggir: Lama Sea, SIC og so Marius, sum so endaði við at fara við sigrinum.

Allir bólkarnir vóru kallaðir upp á pallin og ein av dómarunum, sum var frá Danmark kom á pallin og kunngjørdi, at Marius var vinarin av Global Battle Of The bands 2005 í Føroyum. Marius er nú officielt í stóru endafinaluni, sum verður hildin í London í desember.

Vit á Sosialinum ynskja Marius hjartaliga tillukku og góða eydnu víðari.

# Eg eri Marius

*Gjøgnumbrotið kom við Flux, men við sigrinum um vikuskiftið setti Hans Marius veruliga sítt fingramerkið á føroyskan tónleik. Næsti stigið er altjóða umboðan sum føroyski GBOB-vinnarin*

*Mynd: Eyðun Müller*



**Hans Marius Ziska syngur, spælir gittar og skrivar øll løgini hjá Marius. Bólkurin eitur hansara millumnavn - Hetta er hansara bólkur við høvd og garnum. Tí er GBOB sigurin eisini hansara**

**GBOB**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað var ein glaður Hans Marius Ziska, sum eg fekk orð á í telefonini sunnudagin. Hann segði mær, at hann gleddi seg ordiliga nógv til at sleppa til London.

Veitslan koyrdi enn í hægsta geari heima hjá Hans Mariusi í Søldarfirði, og lagið var gott. Hans Marius er Marius. Hann skrivar tónleikin, syngur og spælir gittar. Hetta er hansara bólkur, og hóast tónleikararnir allir eru frálíkir, eigur Hans Marius sigurin í GBOB.

### Gott poppoyra

Hans Marius gjørdist veruliga kendur á føroyska tónleikapallinum í Prix Føroyum 1999, tá Flux í hvítum ketildraktum, fingu allar føroyingar at nikka við til Mr. Headless, nikkanin helt fram í fleiri mánaðar í 15 teimum bestu.

Flux var eins og Marius í stóran mun Hans Marius, og longu tá var týðiligt, at her var talan um ein ungan mann, við ótrúliga góðum oyra fyri fangandi popprokkløgum.

At hann eisini sá gott út og sang væl, gjørdi hann ikki til eina minni stjørnu. Flux spældu saman í fleiri ár, og luttóku aftur í Prix Føroyum í 2001 og 2003, men náddu ongantíð upp á sama popularitet sum við mr. Headless. Bólkurin gjørdi annars longu um seg í 1998, tá teir vunnu poptop konsertina og spældu á Ólavsøkukonsertini.

Flux gav í 2003 eina fløgu út við fimm løgum, tó uttan at hon seldi serliga væl ella varð spæld nógv í loftmiðlunum. Men tað kemst ikki uttanum, at fleiri av løgunum vóru sera góð.

### Betri tónleikarar

Flux er ikki longur, og í staðin er Marius komin, ein bólkur sum tykist at vera einn nýggj útgáva av Flux við betri tónleikarum, men enn við Marius í front og sum høvuðsmanni. Tí var nærliggjandi at spyrja hvør munurin á Marius og Flux veruliga var, tá eg fekk orð á Hans Marius. Hann segði, at Flux og Marius í veruleikanum var akkurát tað sama - Men menn vóru blivnir eldri og meira konsentreraðir, meira við uppá tað og meira kitchuttir.

### Arbeitt við tónleikinum

Bólkurin spældi í summar á G!, og síðan tá hava teir arbeitt nógv við tónleikinum. Hans Marius sigur, at løgini eru blivin nógv betur hesar mánaðarnar. Hann hevur alla tíðina trúð uppá góðskuna í løgunum, men hevur samstundis vita, at tey kravdu arbeiði fyri at gerast enn betur. Hans Marius greiður frá, at tá hann skrivar tónleik, so skrivar hann ikki bara eitt lag, hann skrivar eisini nógv av tí, sum ljóðførini skulu spæla t.d. gittarlinjur og tílíkt, so tá teir arbeiða við tónleikinum, sigur hann ofta tónleikarunum, hvat teir skulu spæla, og hann veit væl, at hann trýstir teir, og at hann nokk er ræðuliga irriterandi viðhvørt. Men hann heldur úrslitið vera blivið ordiliga gott, og tað er hansara projekt. Hann sigur, at hann er ræðuliga glaður fyri tónleikararnar, sum eru hamrarndi feitir.

### Marius fløga

Týsdagin fer Marius í upptøkuhølið í Útvarpinum, har bólkurin saman við tøkninginum Finni Hansen fer at taka fløgu upp. Hesar ætlanir hevur Hans Marius havt rættuliga leingi, men eingin ivi er um, at ein sigur í GBOB ger áhugan fyri eini Marius fløgu munandi størri.

### Eini hús í Leirvík

Eg spurdi Hans Marius, um hvør styrkin var hjá Marius, sum hevði tryggja bólkinum sigurin í GBOB. Hann helt, at styrkin 100% var originalitetur blandaður saman við mainstream og rock'n'roll.

Um hesin originali mainstream rock'n'roll tónleikur er nokk til, at Marius vinnur GBOB í London, so vinnur hann 100.000 dollarar. Eg spurdi hann, um hvat peningurin skuldi brúkast til, um hann vann. Hann flenti eitt sindur og helt kanska eini hús í Leirvík...

Konseptið í GBOB er, at bólkarnir sleppa at spæla átta minuttir, uttan ljóðíroynd, hetta eru truplar umstøður, og eg spurdi Marius, um hvat hann helt um hesar umstøður. Hann segði, at um man ikki hevði vunnið, so hevði man nokk hildið tað vera for vánaligt, men nú gjørdi tað einki.

### Marius eru:

Hans Marius Ziska - Rødd og gittar
Ólavur Olsen - Ljómborð og trompet
Jens Pauli Joensen - Trummir
Niels Jákup í Jógvanstovu - Bass
Heðin Ziska - Gittar